# Frágreiðing frá M.A. Jacobsen 2011

M.A. Jacobsen nevndin samdist í ár um ikki at lata bókmentavirðiløn M.A. Jacbsens fyri fagrar bókmentir. Slík avger krevur dirvi, tí siðvenja er at geva hesa virðisløn á hvørjum ári. Semja var í nevndini um, at vit máttu kunnu loyva okkum at seta nøkur dygdarkrøv, tí annars var vandin at tignin kring virðislønina minkaði. Trupult var at taka hesa avger, tí øll eru vit væl vitandi um, at skrivandi fólk ikki hava nóg mikið at liva av frammanundan. Vit royndu tí at finna eina loysn, har peningurin kortini kom bókmentunum til góðar, men har var einki at gera sambært regluverkinum kring virðislønina. Ein broyting, sum avgjørt átti at verið reist onkrastaðni í skipanini.

Virðisløn M.A. Jacobsens fyri yrkisbókmentir var latin Nicolinu Jensen Beder fyri bókina SEYÐUR ULL TØTING. Grundgeving nevndarinnar var henda:
Nicolina hevur við nærlagni, persónligum innliti og hollari rannsakan lýst tilvirking úr skinni og ull úr søguligum og siðsøguligum sjónarhorni. Hennara eldhugi og hegni seta sín dám á hetta megnarverk. Eitt verk av alstórum týdningi, tí tað sigur frá einari tilverutýðandi og siðvandnari framleiðslu, sum er um at fara í søguna. SEYÐUR ULL TØTING gevur samtíðini og eftirtíðini møguleika at kunna seg við siðbundna stovnsrøkt og tilvirking úr skinni og ull.

Virðisløn M.A. Jacobsens fyri mentanaravrik var latin Jógvani Isaksen fyri virki hansara til frama fyri føroyska bókaútgávu. Grundgeving nevndarinnar var henda:
Jógvan hevur seinastu mongu árini staðið á odda í Mentunargrunni Studentafelagsins, sum er vorðið rættiligt forlag í tann mun tað ber til í Føroyum. Mentunargrunnur Studentafelagsins gevur bókamarknaði okkara breidd og dýpd, sum hóvir fólkaræðisligum hugsanar-, talu- og prentfrælsi. Undir leiðslu Jógvans hevur føroyska almennið fingið ein hóp av týðandi samtíðarbókmentum.